## MBF sendir drunn

*– Eitt gott høvi at siga sína hjartans meining um ymisk viðurskifti.* Soleiðis sigur MBF, sum í heyst fer undir eitt tiltak, ið tey kalla Drunnurin. Tey byrja tiltakið við at heita á eitt fólk um at skriva eina grein til heimasíðuna hjá MBF. Hetta skal verða ein møguleiki, at siga sína hjartans meining um okkurt evni, ið hevur við brek at gera. Tann fyrsti sum skrivar sendir síðani áheitanina um at skriva víðari til onkran persón sum viðkomandi heldur kundi gjørt kjakið um viðurskiftir innan brek og politikk ella okkurt heilt annað, ið hevur við brek at gera meiri fjølbroytt. Tann fyrsta sum skrivar til Drunnin er forkvinnan í Ráðnum fyri Brekað, Barbara á Tjaldrafløtti (myndin). Drunnurin hesaferð er nú veruleiki og liggur á okkara heimasíðuni hjá MBF www.mbf.fo



# Tey hasta eftir Óla

**Tá Smyril Line fyri góðum 14 døgum síðani bjóðaði fram túrin, sum tey kalla »Í slóðum føroyinga í Íslandi«, vónaðu tey at kunna fylla ein buss. Tað gjørdust útvið hundrað, sum vildu uppliva gamlar dagar í Íslandi**



*Hon er ikki stór, men sambært upplýsingum er hetta elsta kirkjan á eysturlandinum*

ÍSLAND
*Orð og myndir: Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

**Seyðisfjørður:** Tað eru vælnøgd umboð fyri Smyril Line, sum nú eru á veg heim aftur til Føroya eftir góða og væleydnaða ferð í slóðum føroyinga í Seyðisfirði, Skálanesi og Bakkafirði.

Við í ferðalagnum eru útvið eitthundrað føroyingar, sum fegnir vilja vitja aftur á føroyskar slóðir í Íslandi. Og sambært Óla Jacobsen, so er Bakkafjørður ein av heilt stóru føroysku arbeiðsplássunum í Íslandi í farnum døgum.

- Tað var tosað meiri føroyskt enn íslendskt á Bakkafirði, og sjálvt tá eg var her fyri seks árum síðani, skiltu tey hvørt einasta orð føroyskt, sigur Óli Jacobsen, sum er ferðaleiðari og frásøgumaður á túrinum.

Eisini umboðini á Smyril Line eru stak væl nøgd við undirtøkuna.

– Hetta er munandi fleiri enn vit høvdu torað at droymt um, sigur Annika Larsen Black, sum er søluleiðari hjá Smyril Line á heimamarknaðinum.

Túrurin til Bakkafjørðin umvegis Egilsstaðir og Vopnafjørð gjørdist drúgvur, og eyka drúgvur, tí bussførararnir einar tvær ferðir koyrdu skeivt. Bussarnir og førararnir eru báðir føroyskir, so tað skal sjálvandi verða teimum fyrigivið.

### Glæsilig móttøka

Á Vopnafirði hevði Smyril Line skipað soleiðis fyri, at ferðaleiðarir skuldu vísa okkum runt í bygdini. Men har var gjørt nógv meiri burtur úr, enn umboðini fyri Smyril Line høvdu ánilsi av.

Ferðalagið varð møtt við Merkinum veitrandi uttan fyri bygdarhúsið, og inni í salinum var vælsmakkandi og leskiligt borð reitt til teir næstan hundrað føroyingarnar í ferðalagnum.

- Og tað kom púra óvart á okkum, tí tað var ikki avtalað framman undan, men nakað, sum íslendingarnir sjálvir hava gjørt av sínum eintingum, sigur Annika Larsen Black.

Vopnafjørður er annars ein av teimum býunum ella bygdunum í Íslandi, sum er sloppin stak væl undan kreppuni, sum reikar í landinum í dag. Ein av teimum trimum føroysku kvinnunum, sum búgva í Vopnafirði, Edil Jensdóttir, sigur, at arbeiðsloysi er nærum ikki til í bygdini.

- Vit eru eini 560 fólk, sum búgva í Vopnafirði, og stóra sildafabrikkin í bygdini hevur eini 100 starvsfólk. Hartil er sjálvandi skúli, eldrabýli og ein maskinverkstaður. Og so hava vit eisini eitt slaktivirki, sum fæst nógv við at slakta seyð. So flestu fólk hava arbeiði, sigur Edil Jensdóttir.

### Lítið eftir

Leiðin gekk síðani teir 35 kilometrarnar úr Vopnafirði til Bakkafjørðin. Fyrst varð tó steðgað á við gomlu kirkjuna, sum hoyrir til Bakkafjøðin, hon liggur á einum stað, ið kallast Skeggjastaðir.

Hetta er gamalt kirkjupláss og hevur havt kirkju síðani í 1200-talinum. Hendan seinasta kirkjan er tó bygd í 1845 av viði, og er elsta kirkjan á eysturlandinum.

At enda gekk leiðin so móti Bakkafirði, og har kundu nakrir av teimum, sum høvdu róð út har í 40-unum, kenna seg aftur. Eitt nú Kaj í Bartalsstovu úr Gøtu, sum var í Íslandi eitt ár, í 1944.

Hann greiddi so frá – sum onkur kanska hevur hoyrt á Rás2 – um hvussu teir stríddust á Bakkafjørðinum í teimum tíðum. Hvussu teir noyddust at flekja fiskin í fjøruni, um ikki sluppir lógu inni og kundu keypa ráfiskin.

Okkurt stendur eftir, men nógv er farið, eitt nú húsið, har Kaj og hansara bátsfelagar búðu.

Handilshúsini standa enn, men tað er týðiligt, at tey hava sæð betri dagar. Og í sjálvari bygdini er eisini eitt ávíst tal av sethúsum, sum týðiliga hava sæð betri dagar, men tað forfallið er kortini eldri enn tað eina árið, kreppan hevur herjað í Íslandi.

Óli Jacobsen, ferðaleiðari, visti at siga frá, at flakavirkið í bygdini er endurstovnað við einum handilsmanni úr Reykjavík, sum partur av einum virki í høvuðsstaðnum. Tá hann flutti til Bakkafjørðin stutt síðani við konu og tveimum børnum, vaks íbúgvaratalið í bygdini við fimm prosentum upp í 85.